gult cyan magenta svart



# Umsorgan heldur enn tøkni

*Felagsskapurin hjá norðurlendskum sjúkrasystrum hevði ráðsfund og ráðstevnu á Hotel Føroyum um dagarnar. Tosað varð um tøkni í arbeiðinum. Men tað er umsorgan heldur enn tøkni, sjúklingarnir hava brúk fyri, segði fyrilestrahaldari*



*Luttakararnir á sjúkrasystraráðstevnuni fingu at vita, at sjúklinganrir heldur vilja hava umsorgan enn tøkni* *Mynd: Jens K. Vang*

Edvard Joensen

Á ráðstevnu, sum norðurlendskar sjúkrasystrar í gjár og fyrradagin hildu á Hotel Føroym, varð tosað um, hvussu tøknin kann nýtast í arbeiðinum. Fyrrverandi krabbameinssjúklingur, sum helt fyrilestur, helt at tað, sum sjúklingurin hevur brúk fyri, er umsorgan heldur enn tøknifrøði.

Á ráðstevnu hjá norðurlendskum sjúkrasystrum, sum hildin varð í gjár og fyrradagin á Hotel Føroyum, var ein av fyrilestrahaldarunum ein fyrrverandi danskur krabbameinssjúklingurin, Erik Rasmussen, sum er ábyrgdarlaðstjóri á danska tíðarritinum »Mandag Morgen«. Hann segði frá egnum royndum sum krabbameinssjúklingur. Tað er í lagi at hava nógva og góða tøkni at lætta um arbeiðið. Men tað, sum sjúklingarnir allarmest hava fyri neyðini, er umsorgan. Eitt nú sálafrøðingar og at starvsfólkið annars hevur tíð og umstøður at taka sær av teimum.

Joan Ziskason, formaður í Føroya Sjúkrasystrafelag, sigur, at ráðstevnan var liður í fundar- og skeiðætlan, sum norðurlendsku feløgini regluliga hava. Tað eru feløg úr øllum Norðanlondum, sum limir eru í felagsskapinum. Á ráðstevnuni í Føroyum vóru 75 luttakarar, sigur Joan Ziskason.

Talan var samstundis um stýrisfund, og tað vóru nevndarlimir í norðurlendsku feløgunum, sum vóru savnað á Hotel Føroyum. Hetta var fyrstu ferð, slík stevna varð hildin í Føroyum. Føroya sjúkrasystrafelag gjørdist limur í norðurlendska samtakinum 1. januar 1998. Ráðstevnurnar og stýrisfundirnir ganga upp á skift landanna millum.

Á hesi ráðstevnuni hevur verið tosað um, hvussu tøknin skal takst í brúk og nýtast í sjúkrarøktini. So í grundini kom fyrilesturin hjá Eriki Rasmussen at standa beint tvørtur í móti tí, annars varð tosað um, sigur Joan Ziskason.

Hon greiðir frá, at í Svøríki verður nýggj roynd við tøkni í sjúkrarøktini gjørd. Har verður tað soleiðis, at ein sjúkrasystur situr á eini vaktarstovu, meðan sjúklingurin so hevur samband við vaktarstovuna yvir teldu ella sjónvarp. Einasta, sjúklinginum tørvar er ein fjarstýring, har samband kann fáast við vaktarstovuna og tosast kann við sjúkrasystrina, sum sjúklingurin samstundis sær.

Jú, tað er í andsøgn við tað, Erik Rasmussen, fyrrverandi krabbameinssjúklingur segði um umsorgan, heldur Joan Ziskason.

Annars hava sjúkrasystrarnar tosað um gongdina, sum nú er við væntandi manning á økinum.

Serliga í Noreg mangla sjúkrasystrar. Tað ger, at farið verður víða at leita. Seinasta er, at roynt verður at fáa arbeiðsmegi úr Italia og av Filipsoyggjunum.

Men tað dámar sjúkrasystrunum ikki. Mentanar- og málmunirnir verða alt ov stórir, so mett verður, at tað fer als ikki at bera til.

# Tivoli í dagstovninum



*Dagstovnurin á Oyri fer at halda 10 ára dag komandi vikuskifti* *Mynd: Edvard Joensen*

*Dagstovunrin á Oyri hevur10 ár á baki, og í tí sambandi verður skipað fyri ymsum tiltøkum komandi vikuskifti*

Edvard Joensen

**Oyri:** Tað eru tíggju ár liðin, síðan dagstovunurin á Oyri lat upp. Skipað verður í tí sambandi fyri ymsum tiltøkum á stovninum sunnudagin tann 17. september klokkan 15 til 18.

Saman við foreldrunum hava starvsfólkini á dagstovninum á Oyri skipað fyri, at tíggjuáradagurin verður hildin sum eitt slag av tivoli. Ymisk tiltøk eru fyriskipað inni á sjálvum stovninum, eins og okkurt verður uttanfyri.

Lis Gregersen, sum arbeiðir á stovninum sigur, at tey til dømis hava leigað eina hoppiborg, sum tykist vera rættiliga væl umtókt millum børnini. So eru ymisk onnur tiltøk, sum vanliga eru á slíkum tiltøkum, skipað verða fyri ymsastaðni.

Tiltøkini, skipað verður fyri í dagstovninum á Oyri eru almenn og øll ókeypis. Umframt undirhald verður eisini møguleiki fyri at fá okkurt leskandi, sum starvsfólk og foreldur eisini standa fyri.

Eisini fer eitt orkestur frá musikskúlanum Norðljómi at spæla. Norðljómur er musikskúli fyri næmingar úr Sundalagnum og av Eiði.

Tað ganga 40 børn á dagstovninum á Oyri. Í barnagarðinum eru 26, meðan 14 børn eru í vøggustovuni.

Vøggustovan varð fyrr í ár bygd út. Undan útbygginigini vóru 30 pláss á stovninum. Børnini á stovninum eru í aldrinum frá 0 til 7 ár. Tá børnini eru komin til skúlaaldur, fara tey úr barnagarðinum, og eingi onnur ansingartilboð eru í Sunda Kommunu enn dagstovnurin á Oyri.

*Leygardagin 16. september verður samkoma á Velbastað í samband við, at nýggi skúlin alment verður tikin í nýtslu*



*Nýggi skúlin á Velbastað verður alment tikin í nýtslu leygardagin* *Mynd: Edvard Joensen*

# Skúlin á Velbastað tikin í nýtslu

Edvard Joensen

Nýggi skúlin á Velbastað verður alment tikin í nýtslu á samkomu, sum verður hildin i skúlanum leygardagin 16. septembber klokkan 11.

Anfinn Brekkstein, bygdarráðsformaður í Kirkjubøar Kommunu, sigur, at hátíðarhald verður fyri bæði innbodnum uttanefir og øllum sóknarfólkinum.

Skúlin fer at virka sum bæði skúli og samkomuhús. Samkomuhús er á Velbastað. Tað er ungmannafelaghúsið Sólarmagn. Men har er so trongligt, at mett varð rætt at hava eina samkomuhøll í skúlanum eisini, sigur Anfinn Brekkstein, bygdarráðsformaður.

Til samkomuna, sum verður hildin komandi leygardag, eru umboð fyri grannakommununa, Tórshavnar Kommunu, boðin við. Umframt løgmann, mentamálaráðharran, fíggjarstovnar, pressu og onnur. Og so sjálvandi alt sóknarfólkið í Kirkjubøar Kommunu, sum Velbastað eisini hoyrir til. Eisini fer prestur at siga nøkur orð, sigur bygdarráðsformaðurin.

Boðið verður ábit, umframt at eisini okkurt annað forkunnugt verður á skránni.

gult cyan magenta svart




